LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 15. februar 2016
J.Nr.: LUM-11- 15/00110-27
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðv. klagu um, at Vinnumálaráðið partvíst sýtti fyri innliti í frágreiðing frá grannskoðara

Við teldubrævi 3. september 2015 hevur Kringvarp Føroya sent umboðsmanninum eina klagu um, at Vinnumálaráðið bert hevur latið Kringvarpinum partvíst innlit í eina frágreiðing frá einum grannskoðara um fíggjarlig viðurskifti hjá A í Klaksvík. Í klaguni verður greitt frá, at Kringvarpið hevur fingið innlit í upplýsingar um, at fráfarni stjórin hevði nýtt pening hjá A at rinda fyri ferðaseðil til konuna og til privatar bilútreiðslur, men Vinnumálaráðið hevur sýtt fyri at veita innlit í aðrar partar av umrøddu frágreiðingini. Klagað verður eisini um, at Vinnumálaráðið ikki hevur givið Kringvarpinum eina útgreinaða grundgeving fyri, hví innlit ikki verður latið í alla frágreiðingina.

## Málsgongd

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 4. september 2015, varð klagan send Vinnumálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Vinnumálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 21. september 2015 sendi Vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **“Viðvíkjandi klagu frá Kringvarpi Føroya v/B, dagfest 3. september 2015**
>
> ...
> *Vinnumálaráðið skal viðmerkja:*
> *Avgerðin um at undantaka partar av skjali nr. 10 frá almennum innliti er grundað á § 13, stk. 1, nr. 6 í lóg um innlit í fyrisitingina, ið ásetur, at “Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun,*

*tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni fyri privatum [...] áhugamálum, har tað vegna serliga umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið.”*

Í skjali nr. 10 hevur grannskoðarafyritøkan Spekt Sp/f, sum hevur gjøgnumgingið allar bókingar í 2014, víst á ávís viðurskifti, sum kunnu vera óreglulig.

Grannskoðarafyritøkan sigur greitt, at tað kann ikki avvísast, at møguligar viðmerkingar frá m.a. fráfarna stjóranum kunnu hava týdning fyri frágreiðingina. Fráfarni stjórin hevur tó ikki havt høvi at gera viðmerkingar til skjalið, og Vinnumálaráðið hevur tí avgjørt at undantaka hesar upplýsingar frá almennum innliti.

Grannskoðarafrágreiðingin vísir á, at

- ...
  ...
  ...

Vinnumálaráðið metir, at hetta kann gerast fráfarna stjóranum ein týðandi bági fyri privatu áhugamál hansara, ...

Kringvarpið viðmerkir í klagu síni, at Vinnumálaráðið kann ikki nýta undantaksregluna í § 13, stk. 1, nr. 6 í lóg um alment innlit í sambandi við skjal nr. 10, av tí at Vinnumálaráðið hevur latið innlit í onnur skjøl/aðrar upplýsingar í málinum, har privat áhugamál verða umrødd. Til hetta skal Vinnumálaráðið viðmerkja, at hesi skjølini og hesar upplýsingarnar ikki vórðu undantiknar almennum innliti, tí talan var um upplýsingar, sum frammanundan vóru almannakunngjørdar. Afturat hesum hevur fráfarni stjórin havt høvi at gera viðmerkingar til tær ítøkiligu upplýsingarnar. Hetta framgongur eisini av málinum. ...”

Við skrivi, dagfest 28. september 2015, heitti umboðsmaðurin á Vinnumálaráðið um at útgreina, hvørji skjøl í málinum og hvørjar partar av grannskoðarafrágreiðingini Kringvarp Føroya hevði fingið innlit í, eins og biðið varð um at læna skjølini í sjálvum innlitsmálinum. Vinnumálaráðið varð eisini biðið um at greiða umboðsmanninum frá og/ella lata umboðsmanninum skjøl, sum vístu, hvør og á hvønn hátt upplýsingarnar, sum innlit varð latið í, høvdu verið almannakunngjørdar, eins og Vinnumálaráðið varð biðið um at útgreina sjónarmiðið um, at innlit kundi gevast í upplýsingar, sum ráðið metti kundu undantakast eftir § 13, stk. 1, nr. 6, av teirri orsøk, at tær høvdu verið almannakunngjørdar. At enda varð Vinnumálaráðið biðið um at greiða umboðsmanninum frá orsøkini til, at fráfarni stjórin ikki hevði havt høvi til at viðmerkja allar upplýsingar í grannskoðarafrágreiðingini.

Tann 23. oktober 2015 sendi Uttanríkis- og vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi svar upp á settu spurningarnar:

**“Viðv. klaguni frá Kringvarpi Føroya v/B, dagfest 3. september 2015**
Hjálagt er avrit av teimum skjølum, sum vórðu latin Kringvarpi Føroya. Í skjølunum síggjast tær upplýsingar, sum Vinnumálaráðið hevur undantikið innliti. Talan er um upplýsingar í skjali 1 og 2, ið eru undantiknar eftir § 7, stk. 1 í innlitslógini. Skjal 3 og 4 eru undantikin í síni heild eftir somu áseting. Partar av skjali nr. 10 eru undantiknir eftir § 13, stk. 1, nr. 6 í innlitslógini.

Málið um stjóran í A tók seg upp um miðjan august 2015, tá ið miðlarnir fóru at skriva um málið. Einamest varð umrøtt, at stjórin hevði nýtt pening í heimildarloysi við at hava fingið A at rinda ymsar privatar útreiðslur, t.e. ferðaseðil til konuna og ymsar bilútreiðslur. Málið varð umrøtt á m.a. in.fo, portal.fo, Vágaportalinum og Norðoya Portalinum, eins og viðurskiftini vórðu umrødd í Kringvarpinum og á Rás 2. Málið varð serliga umrøtt í tíðarskeiðinum 18. - 23. august 2015.

Tvær megintreytir eru fyri, at upplýsingar kunnu afturhaldast eftir § 13, stk. 1, nr. 6. Fyrra treytin er, at upplýsingarnar snúgva seg um almenn ella privat viðurskifti, har tað vegna serligar umstøður er neyðugt at dylja málið. Seinna treytin er, at tað ítøkiliga verður mett greitt neyðugt at dylja upplýsingarnar. Mett varð um skjal 10 í mun til hesar megintreytir.

Upplýsingarnar í skjali 10 um fyrrverandi stjóran lúka fyrru treytina fyri at brúka § 13, stk. 1, nr. 6, tí talan er um upplýsingar, har tað vegna serligar umstøður er neyðugt at dylja upplýsingarnar. Vinnumálaráðið metir, at upplýsingarnar, um tær vórðu almannakunngjørdar, kundu gerast fráfarna stjóranum ein týðandi bági fyri privatu áhugamál hansara, ... Seinna treytin fyri at brúka § 13, stk. 1, nr. 6, er, at tað eftir eini ítøkiligari meting er greitt neyðugt at dylja hesar upplýsingar. Ítøkiliga meting Vinnumálaráðsins hevði við sær, at ikki allar upplýsingar í skjali 10 skuldu undantakast almennum innliti eftir § 13, stk. 1, nr. 6. Ítøkiliga meting Vinnumálaráðsins av, hvørt tað var greitt neyðugt at dylja upplýsingar, hevði tískil við sær, at innlit varð latið í partar av skjali 10.

Avgerð Vinnumálaráðsins um at veita partvíst innlit í skjal 10 er sostatt grundað á tvey viðurskifti. Í fyrra lagi er avgerðin grundað á, at fyrrverandi stjórin hevði havt høvi at gera viðmerkingar til ávísar upplýsingar í skjali 10, sbr. skjal 1. Í øðrum lagi er avgerðin grundað á, at upplýsingarnar, sum umrøddu rindan av ferðaseðli og bilútreiðslum, vóru komnar fram alment, áðrenn Vinnumálaráðið fekk fyrstu innlitsumbønina, sbr. omanfyri.

Hetta hevði við sær, at kravið um at dylja upplýsingarnar viknaði í mun til ásetingina í § 13, stk. 1, nr. 6, tí tað er ikki neyðugt at dylja tað, sum frammanundan er alment kent; endamálið við at verja privatu áhugamálini er ikki longur til staðar, og mett varð sostatt, at innlitið tí ikki fór at hava við sær annan skaðavirknað enn tann, sum var frammanundan, tá ið málið av fyrstan tíð gjørdist alment kent.

Við hesum fyrilitum avgjørdi Vinnumálaráðið at undantaka teir partarnar av skjali nr. 10, sum umrøddu viðurskifti, sum ikki vóru alment kend frammanundan, og sum fyrrverandi stjórin ikki hevði havt høvi at gera viðmerkingar til.

Leggjast kann afturat, at Vinnumálaráðið í viðgerð síni eisini metti um, hvørt meirinnlit kundi verða latið eftir ásetingini í § 4, stk. 1, síðsta pkt., og at meirinnlit varð latið í tann mun, tað bar til eftir ásetingunum í innlitslógini annars.

At enda kann upplýsast, at nevndin fyri A hevur viðgjørt og avgreitt málið um stjóran í A. Vinnumálaráðið var ikki partur av hesi málsviðgerð, men varð kunnað um niðurstøðu nevndarinnar aftaná."

Við skrivi, dagfest 2. november 2015, boðaði umboðsmaðurin Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum frá, at umboðsmaðurin út frá svarinum ikki dugdi at síggja, nær og á hvønn hátt umrøddu upplýsingarnar vóru almannakunngjørdar, og tí heitti umboðsmaðurin á ráðið um at greiða frá hesum.

Tann 9. november 2015 sendi Uttanríkis- og vinnumálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> **"Viðv. klaguni frá Kringvarpi Føroya v/B, dagfest 3. september 2015**
> ... Í skrivi frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, dagfest 23. oktober 2015, til Løgtingsins Umboðsmann verður víst á, at upplýsingarnar, sum Uttanrikis- og vinnumálaráðið lat innlit í, vóru komnar fram alment, áðrenn ráðið fekk ta fyrstu innlitsumbønina. Uttanríkis- og vinnumálaráðið almannakunngjørdi ikki hesar upplýsingar.
>
> Hetta - at upplýsingarnar vóru almennar - saman við, at fyrrverandi stjórin hevði havt høvi at gera viðmerkingar til hesar upplýsingar, hevði við sær, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið metti, at upplýsingarnar vóru ikki fevndar av ásetingini í § 13, stk. 1, nr. 6 í innlitslógini."

Tann 12. november 2015, boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at av tí at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum, varð nú farið undir endaligu viðgerðina av hesum málinum.

Í telefonsamrøðu í desember 2015 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at málið um fráfarna stjóran í A varð umrøtt á einum tíðindaportali í august 2015, men at tíðindaportalurin eftir hetta hevur framt tekniskar broytingar, og at tað ikki var møguligt at endurskapa tíðindini.

**Niðurstøða**

Kringvarp Føroya hevur klagað til mín um, at Vinnumálaráðið bert gav partvíst innlit í eina frágreiðing frá einum grannskoðara, sum Vinnumálaráðið hevði fingið frá nevndini fyri A, og sum var ein gjøgnumgongd av bókingum hjá A í 2014.

Kringvarpið hevur eisini klagað um, at Vinnumálaráðið ikki útgreinaði grundgevingina fyri ikki at lata innlit í alla frágreiðingina.

Av skjølunum í málinum framgongur, at Vinnumálaráðið sýtti fyri at geva innlit í ávísar upplýsingar í frágreiðingini frá grannskoðaranum við teirri grundgeving, at upplýsingarnar kundu gerast fráfarna stjóranum ein týðandi bági fyri privatu áhugamál hansara. Víst varð á § 13, stk. 1, nr. 6 í innlitslógini sum heimild.

Undan hesum hevði Vinnumálaráðið givið Kringvarpinum innlit í aðrar upplýsingar í somu frágreiðing við teirri grundgeving, at tað snúði seg um upplýsingar, sum longu vóru almennar, umframt at fráfarni stjórin í A hevði havt høvi at viðmerkja hesar.

§ 13, stk. 1, nr. 6 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) er soljóðandi:

> "**§ 13.** Rætturin til skjalainnlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi

> 1)...
> ...
> 6) privatum ella almennum áhugamálum hjá tí almenna, herundir fremjing av vinnuvirksemi tess almenna ella privatum ella almennum áhugamálum, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið.
> *Stk. 2.* Um umstøður, sum nevndar í stk. 1 bert gera seg galdandi fyri ein part av einum skjali, skal viðkomandi gerast kunnigur við restina av innihaldinum í skjalinum."

§ 13, stk. 1, nr. 6 er ein undantaksregla, sum einans kann nýtast í heilt serligum førum. Endamálið við ásetingini er at verja somu áhugamál, sum eru vard í lógini annars, men sum tó ikki eru fevnd av ítøkiligari áseting.

Grundarlagið fyri frágreiðingini hjá grannskoðaranum er ein gjøgnumgongd av bókaðu rakstrarútreiðslunum hjá A í 2014. Sambært frágreiðingini hevur grannskoðarin einans tosað við nevndarformannin í A og ikki við fráfarna stjóran ella onnur starvsfólk, og frágreiðingin tekur tí fyrivarni fyri, at viðmerkingar frá teimum nevndu kundu havt týdning fyri frágreiðingina.

Eftir at hava lisið grannskoðarafrágreiðingina eri eg samd við Vinnumálaráðnum í, at upplýsingarnar í grannskoðarafrágreiðingini eftir eini ítøkiligari meting og grundað á umstøðurnar í málinum kunnu undantakast frá almennum innliti við heimild í § 13, stk. 1, nr. 6.

Eg havi einki at viðmerkja til grundgevingina, sum Vinnumálaráðið gav Kringvarpinum fyri at sýta innlit, tí eyðsæð er, at slakast kann upp á krøvini til grundgevingina, um ein neyv grundgeving annars hevði avdúkað viðurskifti, sum av røttum kunnu undantakast innliti.

Hóast Vinnumálaráðið í útgangsstøðinum metti, at allar upplýsingarnar í frágreiðingini frá grannskoðaranum kundu undantakast frá innliti við heimild í § 13, stk. 1, nr. 6, gav ráðið sum nevnt innlit í upplýsingar um ferðaútreiðslur og útreiðslur til bilin hjá stjóranum. Grundgevingin var, at upplýsingarnar frammanundan vóru almannakunngjørdar, og tískil var endamálið við at verja áhugamálini ikki til staðar longur.

Vanliga kunnu myndugleikar ikki undantaka upplýsingar frá innliti, um hesar sambært øðrum reglum eru alment atkomiligar ella almannakunngjørdar. Vinnumálaráðið hevur upp á fyrispurning undir viðgerðini av klaguni greitt mær frá, at upplýsingarnar vóru umrøddur á einum tíðindaportali í august 2015. Tað hevur tó ikki undir klaguviðgerðini eydnast at fingið skjalprógvað, at upplýsingarnar, sum Vinnumálaráðið gav Kringvarpinum innlit í, frammanundan vóru almannakunngjørdar ella í hvørjum høpi.

Eg havi gjøgnumgingið tíðindaflutningin um hetta mál á internetinum, og sambært tí tilfari, sum í dag er atkomuligt á internetinum, verða smálutirnir í málinum á fyrsta sinni viðgjørdir í útvarpssending í Kringvarpinum 21. august 2015, t.v.s. sama dag, sum Vinnumálaráðið gav

Kringvarpinum innlit í upplýsingarnar um ferðaútreiðslur og útreiðslur til bilin hjá fráfarna stjóranum. Eftir hetta vísti øll fjølmiðlaviðgerðin av málinum til Kringvarp Føroya sum keldu.

Ein almennir myndugleiki hevur skyldu til at lýsa faktisku og rættarligu umstøðurnar í einum máli og skjalprógva grundarlagið fyri avgerðunum. Havandi í huga, at viðgerðin hjá Vinnumálaráðnum snúði seg um at lyfta verjuna av upplýsingum, sum annars eftir ráðsins egnu meting kundu undantakast innliti við tí endamáli at verja privat áhugamál, haldi eg tað vera sera átaluvert, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið ikki gav spurninginum um at skjalprógva faktiska grundarlagið fyri eini so týðandi avgerð størri ans.

Vísandi til vantandi skjalagrundarlagið í málinum havi eg ikki møguleika at gera meira við spurningin um, undir hvørjum umstøðum ein myndugleiki kann geva innlit í upplýsingar, sum kunnu undantakast rættinum til innlit, um hesar longu eru almennar.

Eg fari at geva Uttanríkis- og vinnumálaráðnum eina átalu fyri viðgerðina av hesum máli.

Burtursæð frá hesum geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður